HEILSUMÁLARÁÐIÐ

## Nakrir munir ímillum nýggja og gamla sjúklingahotellið

Niðanfyri er í stuttum lýstar nakrar av broytingunum í umstøðunum á sjúklingahotellunum.

**Verandi sjúklingahotell**

- Tað er ópraktiskt, at Sjúklingahotellið Tórshavn búleikast á 5. og 6. hædd.
- Tað er ikki bert Sjúklingahotellið, sum heldur til í bygninginum. Har eru íbúðir, kollegium og onnur rúm, sum verða leigað út, mest til ung fólk og lesandi og til onnur endamál. Trupulleikar eru serstakliga við ófriði um næturnar. Eisini tá flutt verður inn ella út, og lyftirnar eru upptiknar í fleiri tímar, kann verða trupult.
- Tað er sera kalt inni á geingunum um veturin og sera heitt um summarið.
- Vindeyguni leka, og talan er eisini um gjóstur.
- Kykt av ymiskum slagi gera um seg, í seinastuni kakkulakkar.
- Tað er eingin hiti á baðirúminum í kømrunum.
- Tær tríggjar lyftirnar eru ofta óvirknar - og ov smáar. Børa fæst ikki inn á sjúklingahotellið.
- Lekar koma ofta fyri á loftinum/rørskipanini, sum hevur vatnskaðar við sær.
- Saknur er í onki uttandura øki at hava, sum kundi verið nýtt um summarið.

**Komandi sjúklingahotell**

- Vit fáa okkara egna bygning og harvið slepst undan ófriði. Bygningurin verðu heitur og innbjóðandi
- Altanir og urtagarður
- Fleiri einkultkømur, so sjúklingar ikki noyðast at sova fleiri inni á sama kamari
- 4 smærri íbúðir og 1 stór íbúð
- Kømur til rørslutarnað
- Fleiri rúmmetrar
- Fleiri uppihaldsrúm
- Nýggjan bygning tætt við Ríkissjúkrahúsið
- Børulyfta
- Mundandi betri umstøður til starvsfólk

**Heilsumálaráðið, 10. november 2011**

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: hmr@hmr.fo